*Framhald av forsíðuni*

heldur Helga Gerðalíð.

Tørvurin á strúkarum er stórur. Og arbeitt hevur eisini verið við at fingið fleiri, men í Klaksvík hevur tað ikki eydnast so væl.

- Bíðilistarnir eru langir. Men tað er næstan bara klaver, sum hevur bíðilista. Til strúkarar eru altíð pláss, og oftast eisini til messing. Tað vísir seg, at klaver og floytur er tað, sum er best umtókt.

Tað er ongin trupulleiki við lærarum á Musikkskúlanum. Í Klaksvík eru tað fýra lærarar, sum búgva í Klaksvík, og gittarlærarin og cellolærarin ferðast úr Havn.

- Í vetur hava vit fingið Høgna Klakstein at undirvísa í slagverki eisini, so tað er ikki nakar trupulleiki við lærarum. Vit fáa eisini nýggjan messing-lærara nú. Spurningurin er meira um, hvussu nógvir pengar verða okkum játtaðir, sigur leiðarin á Musikkskúlanum.



*Børn á Musikkskúlanum spæla á eini konsert*

### Hølisviðurskifti

Musikkskúlin í Klaksvík er í Gamla Skúla í Gerðagøtu. Og viðurskiftini har eru ikki av tí besta.

- Okkara størsti trupulleiki er hølisviðurskiftini. Vit eru í roynd og veru heppin at hava okkara egnu høli, tí vit eru tann einasti skúlin saman við Havnini, sum hevur egin høli. Hinir musikkskúlarnir halda til í fólkaskúlunum. Men skúlin her er gamal og illa isoleraður, og rúmini eru bæði ov smá og ov fá, sigur Helga.

- Tað er týdningarmikið, at lærararnir fáa undirvíst samstundis, og ikki alla tíðina noyðast at passa seg eftir hvør øðrum. Undirvísingin byrjar ikki fyrr enn aftaná skúlatíð, so vit hava ógvuliga avmarkaða tíð at undirvísa í, so vit eru minni heppin við arbeiðstímunum.

Ætlanir hava ligið frammi á borðinum um útbygging ella við at flyta í onnur høli, men tað hongur alt í leysari luft enn. Serskúlin er hinumegin veggin, og teirra umstøður eru heldur ikki ov góðar.

- Umstøðurnar fyri tónleiki í Klaksvík eru sum heild vánaligar. Vit hava onki konserthøli og fyri skúlan her, eru umstøðurnar langt frá nøktandi, heldur Helga, sum tó ikki vil geva nøkrum einstøkum skyldina fyri hetta.

- Kommunan hevur ábyrgd av, at skúlin fær høli, so tað er teirra borð, men viðvíkjandi konsertsali, so eru tað nógv sum kundu tikið ábyrgdina av tí.

### Meira klassiskt

Helga Gerðalíð metir tað verða ógvuliga týdningarmikið at leggja tónleik í børnini frá ungum árum av.

- Ja, hetta kundu vit tosað leingi um, sigur hon og flennir. - Tey flestu byrja á musikkskúlanum um sjey-átta ára aldur. Men um tey skuldu byrjað fyrr, so hevði hetta kravt eitt nógv størri samstarv millum nógv lið. Foreldur, lærarar, skúla, og so framvegis.

Eitt sindur fílist Helga tó inn á útvarpið.

- Útvarpið kundi væl gjørt meira við klassiskan tónleik. Bæði lættan og tyngri. Tey spæla mest undirhaldstónleik, og børnini vaksa upp við poppi og rocki. Vit undirvísa í klassiskum, og okkum vantar eina brúgv ímillum. Musikklærarafelagið hevur víst á hetta, og teir eru eitt sindur argir inn á útvarpið, tí tað sum almennur stovnur átti kanska at verið meira upplýsandi.

Kanningar vísa eisini, at børn sum læra at spæla eitthvørt ljóðføri hava lættari við at læra í skúlanum. Tey klára betri at savna seg, og eisini børn, sum hava havt trupulleikar, og síðani byrja at spæla, eru sloppin av við trupulleikarnar.

- Í hesum tíðum við teldu-spølum og øllum hesum, so eru børn nógv einsamøll. Á Musikkskúlanum spæla tey saman, tá tey venja messing og strúkarar, og soleiðis fáa tey gleði av hvørjum øðrum, og tað er ógvuliga týdningarmikið. Tey mennast bæði sosialt og persónliga í hesum umhvørvinum, heldur Helga Gerðalíð.

- Og tó. Tey sum spæla messing, spæla kanska meira fyri nøkrum, tí tey kunnu fara í hornorkestrið, tá tey eru liðug her. Men vit eru farin undir eitt barnasymfoniorkestur, har Klaksvík, Havn, Runavík og Vestmanna savnast fýra ferðir um árið, sum eitt slag av fyrireiking til symfoniorkestrið. Vit vóna, at hetta fer at vera byrjanin til eitt fast orkestur.

Tað ganga 120 næmingar á Musikkskúlanum í dag. Høvdu øll sloppið inn, sum søktu, hevði talið ligið um 150-60 ella meira.

- Vit gera onki fyri at fáa nýggjar næmingar, tí tá verður tilgongdin so stór, at vit noyðast bara at siga nei, sigur Helga Gerðalíð at enda, sum droymir um ein konsertsal og ein skúla sum eru í sama bygningi.

## EG MEINI TAÐ

# Takk og lov fyri fótbóltin ...



*Bergur Rasmussen skrivar:*

Lønarsamráðingar, kappingarføri, prístal, hamstringar, streykubrótarar, blokadur, verkbann ... ahr! — Hví skal tað vera so kompliserað!?

Suverenitetur, ríkisfelagsskapur, sjálvberandi búskapur, blokkur, loysing, ábyrgdarkensla ... ahr! — Hví skal tað vera so kompliserað!?

Barnadópur, vaksnadópur, samkynd, kvinnuligir prestar, sex áðrenn hjúnalag, herligheitsteologi, skriftstøð ... ahr! — Hví skal tað vera so kompliserað!?

Altíð eru so nógv ting, man skal taka støðu til. So nógv, man skal læra. Og so skal man minnast, hvør segði hvat, hvør gjørdi einki, og nær ov nógv kom av skafti.

Og tað ringasta av tí heila er, at man risikerar at blíva rúkandi ósamdur við sínar góðu vinir. — Vandin er ið hvussu er stórur fyri tí, tá ið hesi stóru evnini koma upp.

Nei, takk og lov fyri fótbóltin

B36, B68, EB/Streymur, FS Vágar, GÍ, HB, KÍ, NSÍ, Skála og VB!

So deiliga nemt. So einfalt og lætt skiljandi. 18 umfør. Heima og úti. — 3 stig fyri sigur, 1 fyri ein javnleik, tap gevur einki! — Og tá ið árið er liðugt, er tann besti meistari, og tann ringasti flytir niður í aðru deild, haðani onkur nýggjur kemur upp.

Ja, takk og lov fyri fótbóltin.

Har sleppa vit at útliva tær stóru kenslurnar.

Dreymarnar, vónirnar, gleðirnar, sorgirnar, vreiðuna, skuffilsini.

Og so hava vit okkurt at práta um, sum ikki krevur djúpari grundgevingar og útgreiningar. Ikki sum hasin innvikladi tónleikurin, ið man skal vita nakað um, áðrenn man kann hava eina meining um hann. Ikki sum bókmentir, ið krevja av tær, at tú skalt seta teg niður og konsentrera teg leingi, áðrenn tú fært nakað burturúr. Fyri ikki at snakka um list!

Uhadada!

Nei, fótbólturin er næstan sum endaleysu sjónvarpsrøðirnar. — Hvør dystur er nýggjur, leikmynstrið gongur aftur frá ferð til ferð, og tað ber til at heinta episodur fram úr minninum, ið líkjast. Og tað allarbesta er, at leikur er greitt defineraður, hvat longd og symbolikki viðvíkjur. — Og tá er eitt mál tað absalutt størsta, ikki sannheit?

Tað er eitt satt vælsignilsi aftur at sleppa at kjakast um gongdina. Aftur at sleppa at umrøða dómaravillur, lekrar avleveringar, flott mál og miniskar, trælør, forstrekningar og landsliðsúttøkur av sjálvsagdum evnum, hopileysum tilfeldum, ella kanska gongur onkur sonn stjørna eftir, ið landsliðsvenjarin og hjálparmaður hansara simpulthen ikki finna útav at seta inn á liðið? — Hvat ólukkan fáa teir sína løn fyri?

Johannus Páll Pávi Annar hevur sku fatur í nøkrum av tí rætta, tá ið hann sigur, at ‘Av øllum týdningarleysum tingum her í lívinum, hevur fótbólturin nógv tann størsta týdningin!’

Bert spell, at tey týdningarmiklu tingini eru so kompliserað!

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



# Fólk trívast best í Norðurlondum

## Álit er versnað millum fólk. Illa stendur til í Bretlandi, í Norðurlondum er tó enn hampuligt statt í so máta, vísir bretsk gransking



KANNING

*Annika B. Mortensen*

Bretar hava aldrin verið meira illgrunasamir móti hvør øðrum enn í hesum døgum. Álit millum fólk í Bretlandi er farið í helvt seinastu 40 árini. Tað vísir ein kanning, gjørd av akademikaranum David Halpern frá Cambridge Universitetinum. David Halpern er samstundis ráðgevi í strategisku deildini á Downing Street - ein av heilunum sum Tony Blair nýtir sum stuðul og ábending um, hvussu støðan í ríkinum er. Orsøkin til illtrúnaðin stavar sambært kanningini frá vaksandi syndring í samfelagnum: hjúnaskilnaði og upploysing í samfelag samlagnum. Kanningin er ikki einans gjørd í Bretlandi, men kring allan heimin.

Kanningin kann grundast á bretsku stjórnina, sum roynir at staðfesta, hvat ið ger fólk glað og hvussu ymiskar brotsgerðir, so sum vandalisma og onnur lógarbrot, sum hava upprunað í trivnað, kunnu beinast burtur ella minkast.

Kanningin vísir, at í 1960-unum hildu 60% av bretum, at onnur fólk sum heild vóru álítandi. Í byrjanini av 1980-unum var talið fallið til 44% og í dag er talið einans 29% og óivað fallandi. Serfrøðingar halda orsøkin til broytingarnar stava frá: meiri sosialari flyting (mobilitet), vaksandi tali av hjúnaskilnaðum, meira innflyting av fólki og ein meiri ágangandi trúgv uppá individualitet sum er vorðin ein nútíðar siðalæra. Serfrøðingar halda, at útviklingurin hevur borið við sær: minni frælsi, verri heilsu og sum heild minni gleði millum fólk.

Bretland er ikki einasta landið í hesi støðu. Í Amerika, Australia og Írlandi er støðið av misáliti eisini vaksið seinastu 20 árini. Øvut hesum enskttalandi londunum vísir kanningin, at Norðurlond hava tað hægsta støðið av áliti. Í Danmark og Svøríki, sum hava hægsta støðið í Europa, siga heili 70% av íbúgvinum, at tey hava álit á fólki. Frankaríki hevur lægsta støðið av áliti í Europa. Einans fimti hvør fraklendingur sigur seg hava álit á onnur fólk. Serfrøðingar halda, at ein orsøk til støðuna í Frankaríki kann vera nýliga stríðið um innflyting av fólki til landið.

Sambært David Halpern er tað tann vaksandi vælstandurin sum hevur misálit við sær. Við ríkidømi er einstaklingurin ikki longur bundin at øðrum fólki. Halpern vísir millum annað á, at nú á døgum nýtist familjan ikki so frægt sum at hyggja í sjónvarp saman tí hvørt húski aloftast hevur fleiri sjónvørp. Framburður í vælstandi hevur við sær, at einstaklingar hava hug til at burturgoyma seg frá umheiminum.

Serfrøðingar í almannamálum siga, at orsøkin til minkandi álitið millum fólk er fjøltáttað. Fólk eru meir upptikin í dag enn fyri 20 árum síðani, meginparturin av fólki eru einsamøll, búgva langt burtur frá familju og kenna ikki longur grannan. Nú á døgum ræðast fólk harafturat alsamt meira brotsgerðir. Vanlig fólk, sum eru lutfallsliga trygg, hoyra á hvørjum degi um brotsverk ígjøgnum fjølmiðlarnir og hetta veksur um óttan. Tað eru fá støð í Bretlandi, har børn verða loyvd út einsamøll. Nútíðarinnar arbeiðsumhvørvi førir harafturat við sær, at vit síggja fremmandafólk sum ein hóttan og ikki sum vinfólk - handilsumhvørvið í øllum heiminum er vorðið meiri glúpskt og í Bretlandi eru arbeiðssáttmálar í nógvum førum stuttfreistaðir. Mangar bretskar fyritøkur eru eisini givnar við at hava sosial tiltøk, so sum jólaborðhald og ítróttartiltøk. Fólk hava ikki longur eina persónliga ábyrgd yvir fyri arbeiðsplássinum og eru aloftast eisini sæð sum óneyðug. Tað er altíð onkur annar sum kann gera arbeiðið - maður kemur í mans stað.

Ymiskar hendingar tvey tey seinastu áratíggjuni í Bretlandi hava óivað gjørt sítt til, at álitið millum fólk er horvið. Nevnast kunnu verkføllini hjá námsarbeiðarum, meðan Margaret Thatcher var forsætisráðharri, sum styrkti sosialu stættirnir og kleyv tær enn longri frá hvør aðrari. Og fyri nøkrum árum síðani var komið fram á, at bóndur høvdu givið neytum fóður, har heilin av deyðum neytum var blandað uppí. Hetta førdi til neytaøði, og mong fólk mistu álitið á matídnaðin.

Robert Putnam, sum er professari á Harvard Universitetinum, heldur, sambært The Sunday Times, at fólk høvdu meiri álit í 1950-unum, tí at annar veraldarbardagi var ein felags uppliving fyri fólk. Hann heldur, at tað serliga eru ættarliðini eftir annan veraldarbardaga, sum hava torført við at líta á onnur. Putnam hevur skrivað bókina "Bowling Alone", sum er um vaksandi støðið av avbyrging millum fólk í Amerika 25 tey seinastu árini. Sambært Putnam eru fólk, sum hava álit á onnur, heilsusterkari. Tey liva longri, hava færri hjartatilburðir og eru í minni vanda fyri at líða av tunglyndi.

Vanliga fólkið í Bretlandi hevur ikki einans minni álit á onnur fólk í gerandisdegnum, men eisini á politikarar og stovnar. Sambært bretsku avísini The Guardian er álitið millum læknar og sjúklingar eisini minkað. Tí er avgjørt, at ein kanning skal setast í verk, sum skal hyggja at, hvussu álitið kann endurskapast. Møguliga skal lækna útbúgvingin broytast so at læknar kunnu læra at ganga um sjúklingar sum javnlík menniskju - hierarkiska hugsanin millum læknar og sjúklingar skal burtur. Hugsað verður eisini um at broyta lógina fyri at fyribyrgja sjúklingum at stevna hvørja ferð læknar gera mistøk.

Nakrir serfrøðingar tosa um, at vit hava meiri álit á fólki, sum eru sum vit sjálvi. Her verður hugsað um etniskan ymisleika og hvussu stór tann sosiala flytingin í einum landi er. Hendan hugsanin kann verða ein frágreiðing fyri, at álitið í Skandinavia er størri enn millum annað í USA og Englandi. Menniskju í Norðurlondum eru meir einsháttað. Londini í Skandinavia eru á mongum økjum eisini betur fyrireikað vælferðarsamfeløg, og tískil er stættamunurin ikki eins stórur sum í mongum øðrum londum. Minni stættamunur hevur samstundis við sær, at tað ikki finnast stórir bólkar av fólki, sum eru ónøgd við stýrið í landinum. Hugsanin her er, at felagsskapur og ein felags kensla mótvegis eini tjóð skapar samábyrgd og minkar um talið av summum brotsverkum, so sum vandalismu. Sambært álitiskanningini er Danmark tann glaðasta tjóðin í Europa. Einki verður nevnt um Føroyar, men man tað ikki vera á sama støði sum Danmark ella kanska eru vit enn glaðari í Føroyum.

Vit liva í nýggjum tíðum og tað er ikki einans møguleikin fyri flyting av fólki um landamørk, sum broytir lyndið hjá fólki. Tøkni hevur eisini ein stóran leiklut. Tað er tøknin, sum á hvørjum degi ber søgur um ræðuligar brotsgerðir inn í stovur okkara. Mong sita avbyrgd frá umheiminum og hava samskifti við onnur um alnetið, og alnetið kann eisini vera ein av orsøkunum til, at álitið millum læknar og sjúklingar er broytt. Við alnetinum hevur almenningurin atgongd til at finna kunning um alt hugsandi. Um ein lækni gevur einum sjúklingi heilivág, sum ikki er tann heilivágurin sum sjúklingurin væntar at fáa, kann sjúklingurin sjálvur kanna málið á alnetinum, so kann hetta skapa misálit.

Um hetta illgrunasama tíðarinnar rák fer at broytast til tað betra ella tað verra, er torført at meta um. Vit kunnu bert sum rættir sjálvsnøktandi einstaklingar fegnast um enn ein ágóða við okkara norðurlendsku vælferðarklettum.